# Samkynd loyvi at ættleiða



**Fólkatingið hevur í dag fyrstu viðgerð av spurninginum, hvørt samkynd, ið liva í skrásettum parlagi, skulu hava loyvi at ættleiða børn**

LÓGARBROYTING
*Eydna skaale*
*eydnaskaale@hotmail.som*

Tað er Simon Emil Ammitzbøll (UFG), sum hevur sett uppskotið fram. Hann vil hava, at samkynd í skrásettum parlagið skulu hava somu rættindi at ættleiða, sum hinkynd pør og einlig. Ammitzbøll vísir á, at milliónir av børnum liva undir vánaligum umstøðum, og bert ein stórur innsatsur ímóti fátækradømi, kann hjálpa hesum børnunum. Ættleiðing kann kann hjálpa nøkrum av hesum illa støddu børnunum til ein tryggan og góðan uppvøkstur. Hann sigur víðari, at samkynd eru júst so væl egnað sum hinkynd, tá tað ræður um at geva børnum eitt gott, trygt heim, umsorgan og kærleika.

Ein treyt skal tó vera, at sínamillum avtalur skulu gerast ímillum Danmark og ymsu ættleiðingarlondini um, hvørt samkynd skulu kunna ættleiða. Londini skulu hava møguleika at nokta, um tey ikki vilja lata børn til samkynd pør.

## Samkynd betri rættindi

Í 1999 varð danska lógin broytt soleiðis, at samkynd hava loyvi at ættleiða børn, sum samkyndi partnarin hevur frá undanfarnum parløgum. Ammitzbøll vísir á, at henda lógin viðurkendi eginleikarnar hjá samkyndum at uppæla børn, og hann dugir tí ikki at skilja, hví samkynd pør ikki kunnu ættleiða.

Í Norra, Svøríki, Íslandi, Hollandi, Belgien, Stórabretlandi, Spania og Andorra hava samkynd møguleika at ættleiða.

Undan svensku avgerðini um at veita samkyndum møguleikar at ættleiða, var ein stór kanning gjørd. Kanningin vísti, at samlaða granskingin vísir, at børn við samkyndum foreldrum - bæði sálarliga og sosialthava ment seg júst, sum børn frá hinkyndum parløgum. Kanningin vísir eisini, at eingin munur er á kyndmenningini hjá børnum frá sam- og hinkyndum heimum.

Ammitzbøll hevur onga danska kanning at vísa á, men hann er ivaleysur í, at úrslitini mugu metast at verða tey somu í grannalondunum báðum.

## Treytir

Treytirnar skulu vera, at pør, ið ynskja at ættleiða, skulu vera fylt 25 ár, og hava búð saman í minsta lagið 2 ½ ár, tá tey søkja. Tey skulu somuleiðs vera gift ella vera í skrásettum parlagi, umframt at bústaðurin skal vera egnaður at uppala børn í. At enda skal parið vera hampuliga fyri fíggjarliga.

# JÓL Í MIÐBÝNUM




Jólamenninir verða í býnum hvønn seinnapart frá 17. til 23. desember
ì jólavikuna frá 17.-23. desember hevur handlarnir opið
17.-21. desember til kl. 20.00 og
22. og 23. desember til kl. 21.00

| | | |
|---|---|---|
| **17. des** | Kl. 17.00 | Havnar Ungdóms Hornorkestur spælir í gongugøtuni |
| | Kl. 18.00 | Dreingjakórið undir Brúnni syngur í gongugøtuni |
| **18. des** | Kl. 17.00 | Havnar Ungdóms Hornorkestur spælir í Dr. Jakobsens gøtu |
| | Kl. 19.00 | Havnar Hornorkestur spælir í gongugøtuni |
| **19. des** | Kl. 15.00 | 2 jólamenn koma til Havnar. Rossini bíða við Skansan og haðani fara teir niðan í býin á rossabaki |
| | kl. 17.00 | Tann Syngjandi Jólakvartettin syngur í gongugøtuni |
| **20. des** | Kl. 15.00 | Jólaskipið kemur í Vágsbotn við jólamonnum. GHM spælir jólaløg, meðan bíðað verður eftir jólaskipinum |
| | kl.17.00 | GHM spælir í Dr. Jakobsens gøtu |
| | kl.18.00 | Kórið Glymur syngur í gongugøtuni |
| **21. des** | kl.16.30 | Kórið KASSIA syngur á trappuni hjá Ebenezer |
| | kl.17.00 | Frelsunarherurin spælir í Dr. Jakobsens gøtu |
| | kl.17.00 | Tann Syngjandi Jólakvartettin syngur ymsastaðni í býnum |
| **22. des** | Kl.18.00 | Kórið Glymur syngur í Dr. Jakobsens gøtu |
| | Kl.19.00 | Frelsunarherurin spælir í gongugøtuni |
| **23. des** | Kl.19.00 | Havnar Hornorkestur spælir í Dr. Jakobsens gøtu |